DAGSINS MEINING

Fínur Fimmari

Eftir at hava ligið í dvala í eitt ár, hevur Fimmarin í ÚF í heyst verið á skránni hvønn mikudag. Stilurin er strammaður eitt sindur, og sendingin er vorðin uppaftur betri, enn hon var. Fimmarin er týdningarmikil partur av samfelagskjakinum. Útvarpið er sera góður miðil at taka mál upp til kjak í. Hvussu tað eydnast er treytað av, hvussu hegnið hjá teimum, sum standa fyri, er at velja og skera. Hetta hevur eydnast væl hígartil í heyst. Vónin má so vera, at tað, sum verður tikið upp í ÚF, verður loftað og viðgjørt viðari í eitt nú skrivaðu pressuni. Hvussu væl hetta so eydnast er aftur treytað av evnunum at leggja til rættis og hjá samfelagnum at taka lut. Her kunnu vit ikki siga annað, enn at tað hevur vístseg, at okkara Tinghella hevur verið væl vitjað nú í heyst.

Evnið í ÚF mikudagin var fólkakirkjan og serliga um kvinnuligar prestar, og um tað skal vera sundurlisnum loyvt at giftast uppaftur í kirkjuni. Hetta eru mál og spurningar, sum mong ivaleyst hildu vóru avgreidd fyri mongum árum síðani. Kvinnuligir prestar hava verið í kirkjuni í nógv ár, og hjúnaskilnaður og uppafturgifting í kirkjuni hava verið partur av gerandisdegnum í fleiri ára tíggjur.

Sosialurin hevur fleiri ferðir roynt at lysa hesi málini og harvið at fáa kjak í lag um júst hesar spurningarnar. Tað hevur ikki eydnast. Tað tykjast vera fleiri ungir prestar, sum eru ímóti tí, sum annars verður hildið at vera gerandisdagurin nú á døgum, altso kvinnuligum prestur og uppafturgifting í fólkakirkjuni. Men tað hevur ikki eydnast Sosialinum at fáa teir í samroðu at lýsa sína áskoðan. Nú eydnaðist tað Fimmaranum. Tillukku við tí! Kanska fer tað at bera til at halda fram við áhugaverda kjakinum.

Í okkara samfelag er tað tíbetur soleiðis, at tað ber til at hava ymiskar áskoðanir. Fyri fólkarættið er tað avgerandi, at tað ber til at hava ymiskar áskoðanir og at virða áskoðaninar hvør hjá øðrum. Soleiðis er tað, og soleiðis eigur tað eisini at vera í hesum førinum. Men tey eru ivaleyst mong, sum undrast á, at konservativi hugburðurin um kvinnuligar prestar og nei til uppafturgifting í kirkjuni framvegis skal vera millum prestar í fólkakirkjuni.

Í okkara parti av heiminum hevur fólkakirkjan sum oftast verið konseratív og afturhaldandi. Kongur var statshøvd av Guds náði, og kirkjan var partur av valdinum hjá honum. Tey, sum settu seg upp móti kongi og kirkju, settu seg upp móti Gudi. Men tað er ikki alla staðni soleiðis í dag. Eitt nú í 3. heiminum er tað manga staðni soleiðis, at kirkjan gongur undan í stríðnum móti valdsharrunum og misjavnanum í samfelagnum. Kirkjan átekur sær leiklutin sum verji hjá teimum smáu og máttleysu í samfelagnum. Hon er progressiv. Kvinnuligu prestarnir her hjá okkum eru ikki máttleysir, og teir megna at svara fyri seg. Hjúnaskilnaður fer ongantið fram í gleði, men mong av teimum fráskyldu koma fyri seg aftur og vilja royna eina ferð enn. Tað er at undrast á, at tað í fólkakirkjuni eru fólk við ábyrgd, sum vilja nokta teimum hetta. Kjakið reisir nyggjar spurningar. Ein tann mest áhugaverdi er, hvør skal seta dagsskránna og mynda politikkin í fólkakirkjuni. Skulu tað vera kirkjuráðini, prestarnir og biskupur ella skulu tað vera politikarnir. Í kjalarvørrinum á Fimmara kjakinum mikudagin er ein ítøkiligur spurningur, sum átti at verið meiri viðgjørdur, um vígslur framvegis skulu vera í fólkakirkjuni, ella um talan bara skal vera um borgarligar vígslur, soleiðis sum fleiri prestar róðu framundir í Fimmaranum. Kirkjan skal halda seg til boðanina og altarborðið. Alt annað, sum kirkjan hevur fingist við, hevur komið henni í ófari, nevndi ein lurtari. Her er nógv at taka upp í framhaldandi kjaki.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Eru vit ófolkaliga religiøs ella bara seriøs?

Nita Næs
í Nesi í Hvalba

Løgtingsstríðið hevur lagt seg, og politiskir menn og nakrar politiskar kvinnur, tey eru fyri langari tíð síðani farin til verka og royna sum best at tekna, skera til, smíða, vaska og prýða politisku klæði okkara, so at vit borgarar ikki ganga skitin, illa klædd ella nakin.

Valdu landstýrismenninir arbeiða dag og nátt, fáa nógv illa sovið og etið, bara fyri teg og meg. Skattalætta, heilsulætta, sjómansskatt, trygdarlætta og himnalætta - alt hetta fáa vit - við bara at vera tú og eg.

Kommunuvalið er av, somuleiðis hanakampar um borgarasessir og nevndarsessir. Raskir menn og fittligar kvinnur hava funnið sítt pláss og nú er bert eftir at bíða. Torført og leingi er at bíða. Fyrst skal 1. desember koma, síðan 2. og so skal jólamaðurin koma. Adventin er long og lekkur og Jesus er cool. Og hóast tað er leingi at bíða til 1. januar, so er tað feitt at bíða.

Ja, Heðin má bíða, og eftir 1. januar kemur Jan at bíða heilt leingi. Somuleiðis má Tobbi bíða. Øll tjóðveldisfólk mugu eisini bíða nokso leingi. Og øll super religiøs mugu bíða og bíða. Tað er næstan bara Johannes Møllehave, sum sleppir undan. Er tað rættvíst? Eg spyrji bara, orsaka meg!

Politiskir flokkar eksludera. Fyrst var tað javnaðarflokkurin, so var tað tjóðveldisflokkurin, og so var tað sambandsflokkurin. Hvat er hetta fyri svans, nei, orsaka meg, eg spyrji bara.

Politiskir flokkar lofta útblakaðum, útskeldaðum politikarum, so teir aftur gerast glaðir og tryggir, og himnakórið syngur hásong.

Herman Oskarsen sigur nevndarsessin í búskaparráðnum frá sær, og landsstýrismenn lova sama dag heilt og heilagt, at nú fara teir at lurta eftir Búskaparráðnum.

Fjølmiðlar vísa og tosa, venda á høvdið og lova at fara í dýpdina næstu ferð ráð vera.

Norrøna er skuffa av okkum øllum og stevnir til havs.

Religiøsar samkomir byggja út og blanda seg inn í politikk og persónar.

Fólkavaldi politikarin harafturímóti, vil ikki blanda seg í teg og meg, ikki í einstøk mál, viðgera einans mannagongdir og ávísar skipanir. Stik den!

Arafat er farin, demokratar velja Bush, Fogh er glaðar, Kastro dettur, alt meðan túsundtals fólk hvørki fáa vátt ella turt, og øll verðin drýpur høvur.

Børnini spæl í nýggjum kava og oysandi regni og tora enn at droyma, gloyma og fyrigeva.

Eg og tú arbeiða hvønn dag, eta, hyggja eftir Degi og Viku, sova og orka ikki at hugsa meira.

Jú, sunnudagin verður betur, tá fara vit í kirkju at hoyra, hvat prestur sigur.

Atvent - advent

Jógvan Ravnsfjall

Komandi sunnudagur er fyrsti sunnudagur í atvent, og við honum fara vit inn í atventina og nýggja kirkjuárið byrjar.

Eg skrivi hesar reglur, tí tað er vorðið alt meira vanligt, bæði í skrift og ikki minst í talu, at nýta heiti advent og frambera tað júst sum tað verður stavað.

Orðið kemur av latínska orðinum adventum.

Tað eg kenni til frá mínum uppvøkstri, og í talu við eldri fólk, hevur orðið altid verðið framborðið við t-ljóði, sum ætvent, hóast á skrift báðir formarnir hava verði brúktir, atvent og advent.

Orðið atvent, framborðið æt-, liggur eisini betur á tunguni, tí tað eru so nógv gomul føroysk orð, ið hava henda framburðin, meðan øll orðini, ið byrja við ad- eru komin seinni í málið.

Øll orðini, ið sipa til orðið atvent, t.d. atventsljós, atventskransur, hava í dagligari talu altíð verðið framborðin við t-ljóði. Tó vil eg halda at orðini, ið verða bundin til trúðargreinina adventistar, sum oftast hava d-ljóð.

Hvørki Svabo ella Hammersheimb hava orðið í sínum upskriftum av føroyskum orðum, so orðið er helst nýggjari, ikki verið vanligt í føroyskum máli fyrr enn í 19. ella 20. øld.

Í orðabókini hjá M. A. Jacobsen og Chr. Matras frá 1928 stendur orðið skrivað advent, framborðið ædvent.

Í útgávuni frá 1961 er advent, framborið æad- ella ad-, fyrstvaldi formurin, meðan atvent, framborið æat-, er ein síðuformur.

Sama er við Móðursmálaorðabókini, ið kom út í 1998, har fyrstvaldi formurin er advent, framborið eat-, ad-, meðan atvent, framborið eat-, ad:-. er ein síðuformur.

Hetta má verða ein stórt mistak, tí føroyingar lesa ikki ad sum æad ella eat, men bert sum ad, ad:.

Tað vísir seg eisini í dag, at tað unga ættarliðið lærir seg málið meira gjøgnum lestur enn við málsligum samskifti við eldri ættarlið. Tað kemur tíðuliga til sjóndar, tá ið lutrað verður í loftmiðlunum. Eingi orð verða samandrigin longur, alt verður tambað út, bæði sjálvljóð og hjáljóð.

Tí kemur formurin atvent, við framburðinum ætella æd-, at hvørva eftirhondini, bæði í skrift og talu, um vit ikki hava hann sum fyrstvaldan. Best hevði verið um bert tann eini formurin var, men tað tekur ivaleyst fleiri ár at rætta upp aftur mistakið,ið er gjørt.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstoðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

At snara yvir gevind

Lars Jespersen

Tað var ikki sørt, eg var forvitin, tá eg á tinghelluni í Sosialinum tann 12. í hesum kom fram á grein, ið góði vinur mín Rúni Rasmussen hevði skrivað undir heitinum Bush, toleransa og virði.

Rættiliga skjótt í greinini kendi eg Rúna aftur frá tíðini, vit arbeiddu saman, men hevði væntað, hesin høgravendi sjálvstýrismaður, sum hann plagdi at kalla seg, var broyttur, aftan á søgulesna í nøkur ár, men gá.

Fyrsta brotið í greinini kallar hann **USA snaraði til høgru**, og fegnast hann um stórsigurin hjá George Walker Bush á forsetavalinum 2. november, og endar brotið- við at staðfesta, at tann 2. november snaraði USA til høgru.

Sjálvandi kann Rúni frøast um, at hansara maður í USA vann valið hesu ferð, men tað var avgjørt eingin stórsigur, tí sjáldan hevur sigurin verið so tepur, sum júst á hesum valinum. Vit mugu leita fjørути ár aftur í tíðina, fyri at finna líka tepran sigur, og tað sigur ikki so lítið. Rúni leggur sjálvur tølini fram, at Bush fekk 51%, Kerry 48% og Nader lá ímillum og órógvaði valstríðið hjá teimum báðum.

Hesi prosenttøl siga greitt, hvussu tætt var millum partarnar, og at amerikansku veljararnir eru ósamdir, ja, at USA er farið í tvíningar, tí sum Rúni skrivar **Amerikanski veljarin hevur talað.** Hann skrivar síðani, at **Fólkið valdi ein sterkan, avgjørdan, fólksligan og dugnaligan mann at leiða tjóðina tey komandi fýra árini.** Rúni er væl vitandi um, at bara helvtin av fólkinum valdi George Walker Bush, hin helvtin valdi jú Kerry.

Rúni nevnir eisini, hvussu nógvar valmenn Bush fekk í mun til Kerry, men útgreinar ikki, hvussu hesir verða valdir og hvussu órøttvís hendan skipan í verunleikanum er. Órættvísið gav seg at býta á valinum í 2000, tá meirilutin av amerikansku veljarunum valdi Al Gore, men George W. Bush eydnaðist at fáa fleiri valmenn og gjørdist forseti, hóast meirilutin av fólkinum hevði valt Al Gore.

Tá Bush í ár 2000 gjørdist forseti við minnilutanum av fólkinum aftan fyri seg, var frammi, at broyta valskipanina, soleiðis at tað ikki skuldu vera teir fimm sokallaðu svingstatirnir, ið avgjørdu, hvør bleiv forseti í USA. Á valinum 2000 var tað svingstaturin Florida, ið avgjørdi valið, og í ár var tað svingstaturin Ohio. Men valskipanin, ið tryggjaði forsetasessin, verður sjálvandi ikki broytt meðan hendan stjórnin hevur valdið, tað vildi verið býtt, í hon kann koma henni tilgóðar aftur næstu ferð.

At Rúni ger púra greitt, at USA snaraði til høgru 2. november, er at snara yvir gevind, tí republikananarnir hava altíð verið høgravendir, fyri summar av teim tó ov lítið til høgru, tí er stovnaður ein felagsskapur, kallaður neo-konservativur. Hetta er felagsskapur, ið sjálvt stjórnin hjá Bush er á varðhaldi yvirfyri, tí vandi er fyri, at felagsskapurin kann fyriskipa ráðagerðum, konspiratiónum, ið eftir amerikanskari lóg eru ólógligar, tí tær kunnu hótta landsins trygd. Nei, Rúni, republikananarnir hava snaraðið til høgru í fleiri ár, sleppa ikki at snara longur, tí tá mugu teir snara til vinstru.

Eitt áhugavert petti í fyrsta brotið er aftrat, og tað er, at Rúni skrivar **Stórur partur av heiminum, og kanska serliga stórur partur av evropearum, ynskti sær ein annan forseta. Men tað eru jú ikki evropeiskir ella aðrir veljarar, sum skulu velja amerikanskan forseta.** Fyri tað fyrsta, er tað einki forgjørt, at fólk uttan fyri USA kundu ynskt sær ein annan forseta, tí politikkurin hjá eini og hvørji stjórn í USA hevur avleiðingar út um allan heim, Føroyar íroknað. Sjálvandi skulu vit ikki velja amerikanskan forseta, Gud náði okkum, men staðfest er, at helmingurin av amerikanska fólkinum eisini ynskti sær annan forseta, so er tað sagt.

Næsta brotið í greinini kallar Rúni **Anti-bushisma.** Tað er rættiliga harðrent, og kenni eg ikki hampamannin Rúna aftur her. Hann metir, at fólk, ið ikki eru samd við Bushstjórnina og tann politikk, hon fører, bera hatur móti Bush persónliga. At hesi fólk eru anti-amerikansk, at tey eru høpisleys, láturlig, barnslig, snævurskygd, óvitandi, drukna í sínum egnu fordómum og sjálvrættvísi.

Tað er ikki eiti á lortaspann, vit fáa oman yvir okkum!

At vera ósamdur við politikkin hjá Bush-stjórnini er ikki tað sama, sum at hata Bush persónliga, tí tað tænir ongum endamáli. Tað ber ikki til at hata eitt menniskja, ið vit bert kenna frá fjølmiðlunum, situr hinumegin Atlantshavið og er umgirdur av trygdarfólki, ið verjir hann móti ágangi frá m.ø. sínum egna fólki. Tað vildi verið spill av tíð og orku.

At vera anti-amerikansk, grundað á ósemju við politikkin hjá amerikansku stjórnini, hevur einki hald í verunleikanum. Amerika hevur givið okkum nógv gjøgnum tíðina, bæði av góðum og minni góðum. Serliga seinastu fimti árini eru vit, føroyingar og evropear annars, vornir meira amerikaniseraðir, enn vit kanska hava gjørt okkum far um. Tað er ógvuliga trupult, at vera anti-amerikanskur, tá hugsað verður um, at ein stórur partur av amerikansku fjøldini er okkara egna fólk, eftirkomarar av fyrstu niðursetumonnunum, komin úr Evropu, ein heilt stórur partur úr Norðurlondum.

At vit, ið ikki taka undir við øllum, sum Bushstjórnin stendur fyri og fremur, eru láturlig og óvitandi, má takast við størsta fyrivarni. Sjálvur havi eg rættiliga góðan kunnleika til Amerika, amerikansk og altjóða viðurskifti, havi stóran áhuga og fylgi væl við. Tí er tað rættiliga hugstoytt, at tú Rúni sker øll yvir ein kamb. Sjálvandi vantar kunnleiki hjá summum, men teirra kunnleiki stavar kanska bert frá amerikonskum fjølmiðlum, serstakliga sjónvarpsrásum, ið hava gjørt Bush sjálvan til láturs.

Meginparturin av óhumskuni í hesum valstríðnum stavar beinleiðis frá USA, har báðir partar hava tikið grugg av botni, til tess at dálka hvønn annan, hóast tað í byrjanini av valstríðnum var heitt á partarnar, at bera seg sømiliga at. Tað miseydnaðist, men alt tað skitna, ið partarnir hvør sær funnu fram, bleiv sent út um allan heim, og síðani var tað upp til okkara at sálda frá, og tað var ikki altíð so lætt, heldur ikki fyri teg, sum eg skilji.

Triðja brotið kallar tú **Evropeisk toleransa**, og har kemur tú inn á, hvussu týdningarmikið tað er, at skilja tey, sum hava aðra fatan enn ein sjálvur. Gott í teg, men hvat vil tú so við hesi grein um Bush, toleransu og virði, tá tú ikki skilir ella virðir, at onnur hava aðra fatan og tú og høgravendu amerikananarnir. Líka fyri líka!

At Bush er kristin, hava vit ongan trupulleika við, tí vit høvdu roknað við, at allir forsetar í USA frá Washington til Bush hava verið kristnir, eins og vit. Hvat tað nýggja er, ið kallast at vera persónliga kristin, veit eg ikki. Sjálvur eri eg kristin persónliga, kona mín er kristin, børn okkara verða uppald sum kristin, og vit búgva í einum kristnum heimi og kristnum landi, so hvat tú vilt við hasum, veit eg ikki.

At vera ein endurføddur kristin, skilji eg heldur ikki, men eitt veit eg, at George Walker Bush er bert føddur einaferð, nevniliga fyri gott seksti árum síðani. At hann ikki skammast við sína trúgv og gudslív, er ein góður eginleiki – men eg havi heldur ongantíð skammast við mína trúgv og gudslív. Fyri tað eri eg ikki kandidatur til forsetasessin í USA.

Tað er bara eftir mínum tykki ein óskikkur at draga Gudstrúnna hjá einstaklingum upp í eitt valstríð og serliga eitt, sum gjørdist so skitið og tað amerikanska hesu ferð, men alt kann nýtast fyri at fáa maktina, og allar atkvøður telja við.

Sjálvur kenni eg ein høgravendan føroyskan politikkara, ið, tá nærkaðist vali, fylgdi hvørjum líki, ið fór frá Ebenezer í Havn, hóast hann ikki hoyrdi til meinigheitina. Líkið kundi sjálvandi ikki atkvøða, men politikkarans hjávera skaffaði honum atkvøðurnar, honum tørvaði. Ódámligt!

Í triðja broti skrivar Rúni, at Bush er íðin talsmaður móti fosturtøku og íðin talsmaður fyri hjúnabandi millum mann og kvinnu. Tað er støða Bush, og tann rættin hevur hann, eins og øll onnur hava rætt til egnu støðu til hesar spurningarnar, – men í øðrum broti skrivar Rúni, at Bush í 1994 bleiv valdur til guvernør í statinum Tesas og aftur valdur í 1998. Hetta vóru júst árini, tá staturin Texas stóð ovast á listanum yvir statir, ið avrættaðu fangar, ið vóru dømdir til deyða. Ikki eiti á roysni, tá eisini er komið fram, at fleiri teirra, ið vórðu avrættaðir, vóru ósekir, og guvernørurin hevði møguleika at geva teimum grið.

Í hesum árinum hava ymsu statirnir í USA eisini tikið støðu til spurningin um skrásett parlag, ella vígslu av samkyndum. Ein statur, ið ikki hevur sett forboð móti hesum, er heimstaturin hjá George Walker Bush, Texas, og spurningurin er, hvussu nógv Bush kann gera við tann spurningin, tá hann um fýra ár vendir heim aftur úr Hvítu húsunum.

Fjórða brotið kallar Rúni **Kristnu virðini**, og leggur fyri við at gera vart við, at tað ikki vóru búskapermál, sosialmál ella heilsumál, ið avgjørdu amerikanska forsetavalið, men moralsku virðini.

Fyri ein stóran part av amerikanska fólkinum er tað spell, at so lítið rúm var fyri búskapar-, sosial- og heilsumálum, tí hetta eru júst mál, ið nattúrliga hoyra heima í einum valstríði, serliga eftir fýra ára republikanskari leiðslu. Búskapurin gongur skeiva vegin, hallið á handilsjavnanum er metstórt, somuleiðis arbeiðsloysið, og skattalætti er veittur teimum ríku, teim, ið hava meira enn ivaleyst frammanundan, ógvuliga kristiliga handfarið, ella hvussu? Samstundis og tey fáu ríku fáa betri sømdir og gerast ríkari, veksur talið av fátøkum amerikanarum.

Sosialu avleiðingarnar vísa sína svørtu síðu dag um dag, tí myndugleikarnir ikki virðismeta sosialmál nóg ovarliga. Størri og størri partur av fólkinum fellur í fátt, tekur til óráð av ymsum slag, so vit frætta um syrgiligar vanlukkur í heilum. So illa er manga staðni statt, at skotvápn eru partur av búnýtinum í heimunum.

Eitt av málunum í valstríðnum hjá demokratunum var, at øll skuldu sleppa framat heilsuverkinum, men tað vann ikki frama. Støðan er tískil, at tey vælbjargaðu tryggja seg, meðan restin í mongum førum ikki hevur ráð, at keypa sær ella gjalda eina trygging. Harmiligt, at hesi mál ikki vunnu størri frama, men máttu lúta fyri eini høgrasnaring og religiøsari herferð. Tað vildi verið mest natúrligt og mansligt, at øll hesi mál vóru samantvinnað, høgrasnaringin tó undantikin.

At Rúni í sama brotið skrivar, at demokratarnir høvdu undirmett týdningin av morasku virðunum og teimum evangelisku kristnu, og at tað tí gjørdist ein vanlukka fyri demokratarnar. Jú, demokratarnir taptu tepurt valið, men moralsku virðini kunnu ongantíð gerast nøkrum ein vanlukka, uttan so, at religiónin fær eitt slíkt vald, at tað kemur at líkjast Talibanstýrinum í Afganistan ella prestastýrið í Iran. Tá er tað ein vanlukka fyri okkum øll, og sjálvt stýrið hjá Bush hevur stríðst móti slíkum.

At enda í greinini staðfestir Rúni, at tað eru kreftir í Føroyum í dag, sum føra eitt stríð móti okkara grundarlagi sum fólk. Her haldi eg, at Rúni sær trøll á alljósum degi.

Rúni er tó so mikið at sær komin, at hann nevnir keldurnar, hann hevur stuðlað seg til, tá hann hevur skrivað greinina, og keldurnar siga ikki so lítið um, hví eg ikki kenni Rúna aftur.

Eg taki tó í aftur brotið, Rúni skrivar um toleransu, at toleransa er ein vilji at góðtaka og virða meiningar, fatanir og atferð, sum ein sjálvur ikki stuðlar ella tekur undir við.

Við hesum geri eg vart við, at eg góðtaka og virði, at m.o. Rúni hevur aðra meining, fatan og atferð enn eg, og havi tí loyvt mær, at skriva hesa grein, sum partvís eisini er eitt aftursvar til greinina Tillykke den kristne verden! hjá Mogens Tilsted Christensen, Hvalvíksprest, tann 6. november.

Innsent tilfar
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent aðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.